STARVSLÝSING




## Fiska- og djórasjúkudeildin lýsir eftir

# Tveimum djóralæknum

**Lýst verður eftir tveimum djóralæknum til fiska- og djórasjúkudeildina.**
**Talan er um**

- eitt fast starv
- eitt avloysarastarv fram til 30. juni 2009

**Arbeiðsuppgávur**
Størvini fevna um allar veterinerar uppgávur á Fiska- og djórasjúkudeildini, so sum:

- heilsuyvirvøku og sjúkugreining av fiska- og djórasjúkum
- eftirlit, góðkenning og sýnistøku innan alivinnuna sum heild og málsviðgerð í hesum sambandi
- eftirlit við inn- og útflutningi av livandi dýrum
- luttøku í veterineru vaktarskipanini á stovninum umfatandi alt tað veterinera øki.

**Umframt veterineru uppgávurnar koma djóralæknarnir at luttaka í øðrum virksemi á deildini, millum annað:**

- verða við í tilgongdini at góðskutryggja arbeiðið á deildini
- fakligari ráðgeving í kunngerðararbeiði
- luttøku í upplýsandi tiltøkum, so sum skeiðum, ráðstevnum og fundum

Størvini verða í besta mun tillagað til settu djóralæknarnar, men umsøkjarar mugu eisini tola broytingar í arbeiðsøkinum.

**Útbúgving**
Tú skalt vera útbúgvin djóralækni/veterinerur frá einum av norðurlondunum, ella hava eina veterinerútbúgving, sum samsvarar við hesar og sum ger, at tú kann løggildast í Føroyum til embætisdjóralækna.

Umsøkjarar við starvsroyndum innan fiskasjúkur hava fyrimun.

**Vit sóknast eftir fólki við árræði og framfýsni at náa settum málum, og sum:**

- megna at vísa og fasthalda yvirlit í eftirlitsarbeiðinum, og tá ið á leikar
- hava grundleggjandi skil fyri fyrisiting og fyrisitingarligum avgerðum, og sum duga væl at samskifta við onnur
- síggja nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt, men samstundis verða liðleikarar
- hava kunnleika til og eru fús at arbeiða við framkomnum edv-skipanum, sum í stóran mun eru hornasteinurin í arbeiðinum
- hava koyrikort til bil

**Vit bjóða**

- eitt spennandi og sjálvstøðugt arbeiði á eini deild við engageraðum starvsfólki í einum tvørfakligum arbeiðsumhvørvi.
- eitt arbeiði í samstarvi við vinnuna og aðrar myndugleikar
- nýggjar avbjóðingar
- støðuga førleikamenning

**Tíð og setanarviðurskifti**
Størvini eru fulltíðarstørv og verða lønt sambært sáttmála millum Figgjarmálaráðið og Magistarafelagið, sí www.lnd.fo.

**Umsóknir til størvini**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV, viðmælum o.t. skulu verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi **í seinasta lagi mikudagin 16. juli 2008**.

Norsk útgáva av lýsingini verður eisini latin norskum fakportali. Um ivamál verða, er tað føroyski teksturin ið er galdandi.

**Upplýsingar**
Upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Andrias Petersen, settan deildarleiðara, ella Bárð Enni, stjóra.

**Stutt um fiska- og djórasjúkudeildina**
Fiska- og djórasjúkudeildin hevur eftirlit við, at djórasjúkulógin verður hildin. Sum vera man er hetta eitt breitt arbeiðsøkið, ið fevnir um nógvar ymsar vinnugreinar í Føroyum.

Síðani fiska- og djórasjúkudeildin varð sett á stovn, hevur serligur dentur verið lagdur á at skapa tryggar karmar fyri alivinnuna í Føroyum. Alivinnan hevur verið fyri stórum broytingum hesi seinnu árini, bæði orsakað av sjúku og svikaligum søluprísum, men eisini av herdum krøvum frá keyparum og myndugleikunum. Arbeiðið við at tillaga alivinnuna til nýggju krøvini er komið væl ávegis við kunngerðum um rakstur av alistøðum og koppseting av alifiski, og ikki minst við einari munagóðari hugburðsbroyting í vinnuni.

Deildin umsitur eisini djórasjúkulógina í mun til onnur djór, sosum kleyvdjór, kelidjór og flogfenað - eitt nú hoyrir yvirvøka av ridluskriða og fuglakrími undir okkum. Eisini verða flutningsloyvi givin til og eftirlit ført við flutningi av livandi fiski og djórum til og um landi.

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
Fax +298 556 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo